YRKISdepilin

# KUNNINGARSKRIV

**Kunnað verður við hesum um:**

**1) Lærutíðina fyri lærusáttmálar innan skrivstovu- og handilsyrkið**
**2) Meginreglur fyri stytting í lærusáttmálum**
**3) Stytting eftir avgerð yrkisnevndarinnar**

**Ad 1) Lærutíðin fyri lærusáttmálar innan skrivstovu- og handilsyrkið:**
Yrkisnevndin innan handils- og skrivstovuyrkið samtykti á fundi tann 6. apríl 2006 at seta fylgjandi mannagongd í gildi:

- Hevur lærlingur onga miðnámsútbúgving áðrenn hann fer í læru, er lærutíðin 4 ár.
  Í 4 ára lærutíðini skal lærlingurin taka FHS-útbúgvingina.
- Hevur lærlingur FHS áðrenn hann fer í læru, er lærutíðin 3 ár.
- Hevur lærlingur HH áðrenn hann fer í læru, er lærutíðin 2 ár.
- Hevur lærlingur student, HF ella HT útbúgving áðrenn hann fer í læru, er lærutíðin 2 ½ ár.
  Í 2 ½ ára lærutíðini skal hann taka ávísar merkantilar lærugreinir.

Broytingin verður galdandi fyri lærusáttmálar innan skrivstovu- og handilsyrkið, sum verða góðkendir eftir 1. juli 2006.

**Ad 2) Meginreglur fyri stytting í lærusáttmálum:**
Yrkisnevndirnar samtyktu á fundi 4. mai 2006 meginreglur fyri stytting í lærusáttmálum. T.d. skal ein í minsta lagi hava 2 ára fulltíðar arbeiðsroyndir fyri at kunna fáa stytting í lærutíðini, og at lærutíðin ongantíð kann verða styttri enn 2 ár.

**Ad 3) Stytting eftir avgerð yrkisnevndarinnar:**
Í lærusáttmálanum, ið liggur á heimasíðuni hjá Yrkisdeplinum (www.yrkisdepilin.fo), eru í hesum sambandi gjørdar ymiskar broytingar. Ynskja lærlingur og lærupláss, at lærlingur ikki skal fáa stytting í lærutíðini, skal hetta týðuliga tilskilast í lærusáttmálanum – sí punkt 2 í sáttmálanum um *stytting av ásettu lærutíðini*. Annars verður lærutíðin stytt í samsvari við loyvdu stytting eftir avgerð yrkisnevndarinnar.
Mint verður á, at hevur lærlingur lokið eina útbúgving eftir Fólkaskúlan áðrenn hann/hon byrjar í læru, skulu próvskjøl leggjast við. Somuleiðis skal skjalprógvast við undirskrift arbeiðsgevarans, um lærlingurin hevur viðkomandi verkligar royndir.

*Yrkisdepilin*
*4. juni 2006*